

**FRÍTÍÐARSTOVA**

*Hóast skúlagongdin fyrst byrjar kl. 9, kunnu næmingarnir koma í skúlan longu kl. 7:30. Í Kelduni er væl útgjørd frítíðarstova við einum hópi av leikum, sum hesar báðar gera brúk av*

svara: Dánjal, Angela, Filip, Martin Óli og Elisabeth. Fyrra var eisini illa, meðan Maria, Nomi og Marianna ikki beinleiðis kunnu tosa við í hesum máli.

Tá spurningurin verður settur, um børnini vita onnur nøvn, har L er í, eru tey skjót at svara: Skúli, Súla, Keldan.

- Ja, tit eru ófør, sigur Birna, og trýstir enn einaferð á talvuna.

## Svangur laksur

Áðrenn børnini rættiliga hava sansað tí, standa brádliga fýra tekningar frammanfyri børnunum: Ein laksur. Ein cola-fløska. Ein ísur og eitt fat við sild.

Hetta skilja børnini fult út, og tey eru beinanvegin við uppá sangin: "Ein lítil laksur eri eg". Lærarin trýstir á ein hátalara á talvuni, og løtu seinni hoyrast tónarnir frá kenda sanginum. Hon trýstir á ein annan hátalara, og nú er meiri tónleikur á.

Men áðrenn børnini stemma enn einaferð í sangin, vil Birna hava svar uppá ein viðkomandi spurning: Er nakað L í laksi?

- Ja, sjálvandi, svarar ein genta, sum kvikliga hevur peikifingurin uppi. - Mamma arbeiðir á Bakkafrost, so tí veit eg tað. Laksur byrjar við L!

Fleiri av hinum eru íðin eftir at svara, men ein teirra er vorðin so troytt av at bíða, at viðkomandi suffar tungliga og sigur hart:

- Nei, nú havi eg bíðað so leingi, og tí taki eg bara hondina niður.

Sjálvt í einum lítlum flokki, er tað ikki altíð at ein fær orðið, tá ein ynskir tað. Tað er helst ein partur av tí at ganga í skúla - eisini einum fRískúla: At ein Lærir eisini við at Lurta.

snorri@sosialurin.fo

**Mamma arbeiðir á Bakkafrost, so tí veit eg tað. Laksur byrjar við L!**

NÆMINGUR

# Viðkomandi spurningar

**Nógvir spurningar hava verið og verða framvegis settir fólkunum aftanfyri frískúlan í Kelduni.Nakrir teirra eru viðkomandi, og tí verða teir settir her á røttum staði:**

### Hví skulu tit hava kristnan frískúla?

- Geva foreldrum eitt annað val at velja skúla fyri síni børn. Í grein 26 í heimsyvirlýsingini hjá ST um mannarættindi stendur m.a. at "Foreldur hava rætt til at velja tann skúlan, børn teirra skulu ganga í." Við øðrum orðum, foreldur hava fyrsta rætt at velja, hvat slag av undirvísing skal verða givin børnum teirra.
- Útbúgving hevur altíð, upp ígjøgnum søguna, verið ein týðandi partur av kirkjunnar arbeiði.
- Frískúlar aðrastaðni vísa góð úrslit (t.d. í Svøríki)
- Heimið og skúlin - sama virðisgrundarlag
- Áhugaði og luttakandi foreldur
- Lærarar og foreldur eru samd
- Kristiligt skúlaumhvørvi – vernd fyri menningini hjá næminginum
- Eitt kristiligt skúlaumhvørvi – er ikki hóttandi – men stuðlandi og fyrigevandi

### Hvat verður munurin á tykkara skúla og einum vanligum fólkaskúla?

- Ein minni skúli við minni flokkum, sum ger eitt heimligari umhvørvi
- Menningarætlanir fyri einstaka næmingin
- Menning av tí heila menniskjanum: Í kunnleika, sosialt, likamliga og andaliga
- Forskúli, skúli og frítíðarstova – alt á einum staði
- Størri áherðsla á tey kristnu virðini í skúlaumhvørvinum

### Hvussu verða foreldrini tryggjað, at næmingarnir fáa eina breiða undirvísing?

- Tað eru ávísar mannagongdir, sum ein frískúli skal fylgja. T.d. stendur í lógini um frískúlar, at undirvísingarætlan skúlans skal góðkennast av landsstýrismanninum í mentamálum
- Frískúlin kemur at fylgja støðinum í lesiætlanini fyri fólkaskúlan
- Opinleiki og gjøgnumskygni skal eyðkenna skúlan
- Næmingarnir skulu verða eggjaðir til at seta spurningar til alt millum himmal og jørð og at hugsa sjálvstøðugt
- Starvsfólkið verður eggjað til at taka skeið og vitja aðrar skúlar hvørt ár, fyri at fáa nýggjan íblástur

### Hvørji krøv verða sett til lærararnar?

- Fyrst og fremst er umráðandi, at teir hava námsfrøðiliga útbúgving, sum gevur neyðugu førleikarnar til undirvísing.
- Lærararnir mugu kenna visjónina fyri skúlan og taka undir við henni fyri at kunna arbeiða á skúlanum. Tað er umráðandi fyri, at skúlin kann fremja tey mál, sum eru sett
- At teir hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- At teir duga at samstarva og eru til reiðar at menna tað námsfrøðiliga arbeiðið á skúlanum.